

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 10 - 2012

# Oljudálking skal steingja Hormuzsundið

Iran hevur fleiri ferðir hótt við at steingja tað sera týdningarmikla Hormuzsundið, um Vesturheimurin heldur fram við at seta tiltøk í verk ímóti landinum. Umleið 40 prosent av allari oljuni í heiminum kemur ígjøgnum sundið, og tað hevði tí fingið sera umfatandi avleiðingar, um sundið bleiv stongt. Nú vil týska blaðið Der Spiegel vera við, at ovastin fyri teirri iransku kollveltingarhirðini hevur eina ætlan um, hvussu Iran skal steðga skipaferðsluni ígjøgnum sundið. Sambært blaðnum er ætlanin hjá ovastanum, Mohammad Ali Jafar, at sigla eitt fullfermt tangaskip á land í sundinum og á tann hátt at skipa fyri tí størsta oljulekanum, sum heimurin nakrantíð hevur sæð. -Málið er at steðga allari skipaferðslu fyribils og á tann hátt at revsa tey arabisku londini, sum eru í parti við Vesturheiminum. Samstundis er málið at noyða umheimin at hjálpa til við ruddingini og at fáa londini í Vesturheiminum at sleppa tiltøkunum ímóti Iran, skrivar Der Spiegel. Tað týska blaðið vil ikki siga, hvar ella hvussu tað hevur fingið fatur á upplýsingunum, men blaðið sigur, at vesturlendskar fregnartænastur eru í ferð við at kanna ætlanina. Sambært kelduni hjá Der Spiegel skal kollveltingarhirðin bara hava tilsøgn frá Mahmoud Ahamdinejad, forseta til at seta ætlanina í verk.

